Nr. 57

**Hergeir Nielsen**
**Jenis av Rana**
**Kári á Rógvi**
**Høgni Hoydal**
**løgtingsmenn**

**Broytingaruppskot**

**til**

**3. viðgerð**

**av tingmáli nr. 19/2008: Uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri fíggjarárið 2009**

# § 1. Løgtingið

| | | Útr. - Tús. | Innt. kr. - |
|---|---|---|---|
| **1.10.2. Stovnar knýttir at løgtinginum** | | | |
| 10.2.01. Landsgrannskoðanin (Rakstrarj.) | U: | 5.478 | - |
| | **BU:** | **500** | **-** |
| 10.2.07. Løgtingsins umboðsmaður (Rakstrarj.) | U: | 2.880 | - |
| | **BU:** | **520** | **-** |

Viðmerkingar:

Fíggjarnevndin hevur í áliti sínum til fíggjarlóg 2009 lækkað játtanina hjá Løgtingsins Umboðsmanni við kr. 520 tús. fyri 2009.

Hetta kann koma at geva umboðsmanninum trupulleikar við virkseminum komandi ár, m.a. um tørvur verður á einum setursumboðsmanni.

Joen H. Andreassen fvr. umboðsmaður hevur higartil virkað sum setursumboðsmaður. Hann hevur boðað frá, at hann ikki ætlar at átaka sær fleiri uppgávur. Útreiðslur til setursumboðsmann kunnu tí gerast munandi hægri komandi ár.

Tað er heldur ikki í tráð við umboðsmansskipanina og sera óheppi fyri rættartrygdina, um fíggjarjáttanin skal verða avgerðandi fyri, um eitt mál verður kannað ella tikið upp til viðgerðar. Tað er tvørturímóti av stórum týdningi, at játtanin til stovnin altíð er so rúmsátt, at hon ikki er ein forðing fyri eftirlitsuppgávum umboðsmansins.

Tað er rætt, at umboðsmaðurin ikki brúkar alla sína játtan í hesum árinum. Henda upphædd verður bert brúkt, um neyðugt verður at seta ein setursumboðsmann ella um ávís mál krevja serliga serkøna hjálp ella kanningar, og er tað tí ikki neyðugt at skera játtanina til stovnin við 520 tús.kr., so sum løgtingið hevur samtykt eftir tilmæli frá fíggjarnevndini.

Landssgrannskoðanin er eisini lækkað í ein slíkan mun, at stovnurin virksemi hjá stovninum ikki kann røkjast á ein nøktandi og forsvarligan hátt.

**Á Løgtingi, tann 19. desember 2008**

Hergeir Nielsen Jenis av Rana

Kári á Rógvi Høgni Hoydal